# kkandi

skipanunum og eisini í mun til, hvat somu persónar høvdu havt eftir, um teir mynstraðu við norskt ella danskt skrásettum skipum. Við øðrum orðum eru sjálvt føroysk sjófólk verri fyri undir FAS enn somu sjófólk høvdu verið undir øðrum líknandi skipanum aðrastaðni.

Hentzar sigur, at ein orsøkin til, at tað hóast hetta hevur eydnast Tor Shipping at fáa fleiri skip undir sín "hatt", helst er, at felagið higartil hevur kunnað mannað skipini við føroyskum sjófólki, og serliga yvirmenn eru í dag ein mangulvøra world wide, sum hann tekur til.

- Men spurningurin er, hvussu hetta fer at eydnast í framtíðini, um umstøðurnar hjá manningunum ikki gerast betur, leggur hann aftrat.

### Meira í lønarposa

Hentzar Steingrímsson sigur, at føroyska altjóða skipaskrásetingin í ongantíð er komin veruliga upp at standa, og tað er eingin loyna, at skipanin virkar ikki nóg væl.

- FAS-skipanin kom í sínari tíð sum ein neyðloysn fyri ávís skip, men í dag hevur skipanin stórar kappingarneytar í norsku og donsku skipanunum.

Hann sigur, at felagið javnan fær uppringingar frá føroyskum sjófólki, sum heldur vilja sigla undir norsku og donsku skipaskráunum, tí hesar geva teimum meira í lønarposan. Hetta er tann stóri trupulleikin í løtuni, sigur hann.

- Føroyska altjóða skipaskrásetingin liggur undir vinnumálaráðnum, og eg haldi, at tey signalir, sum vit hava hoyrt seinastu tíðina, siga okkum, at myndugleikarnir eru sinnaðir at gera nakað við málið.

Men, leggur Hentzar Steingrímsson aftrat:

- Vilja vit hava eina veruliga altjóða skipaskrá í Føroyum, er neyðugt at gera hana so attraktiva, at hon stendur seg í kappingini við hinar skráirnar. Tað gevur í hvussu er lítla meining, um okkara FAS-skipan eftir eina broyting framhaldandi verður minni attraktiv enn NIS og DIS-skrásetingin, sigur hann.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Prosper er eitt av skipunum, sum siglir undir føroyskum flaggi – og verður umsitið av Tor Shipping*



*Thor Alpha er fyrri nýbygningur hjá Thor, hin seinni verður liðugur til heystar*

*Mynd: Skála Skipasmiðja*

# Thor – ein kendur veitari á sínum øki

## Felagið arbeiðir at kalla um allan knøttin í frálandavinnu, og fiskiførini fiska bæði í føroyskum sjógvi og á fjarskotnum leiðum

Teir byrjaðu so smátt í fiskivinnuni uppundir samfelagskreppuna í 1990, og í 1994 stovnaðu teir felagið Thor. Tey fyrstu árini fevndi virksemið um fiskiskipavinnu, og tað var her, at teir sóu møguleikar, hóast samfelagið var í svárari kreppu.

Thor-menninir vóru millum teir fyrstu, sum tóku upp garnaveiði eftir tvørámenninar, Viberg Sørensen og Mannbjørn Solmunde.

Nøkur fá ár eftir, at felagið varð stovnað, sóu teir fyri sær møguleikar í frálandavinnu, og síðan hevur tað gingið skjótt hjá teimum at lagt lunnar undir hesa vinnu, ið er hin størsta av sínum slagi hjá nøkrum føroyskum felag.

Aftanfyri fyritøkuna í Hósvík standa í fyrsta lagi brøðurnir, Hans Andrias og Gunnbjørn Joensen.

### Gongd kemur á

Eftir 1997 byrjaðu teir rættiliga at síggja møguleikar í frálandavinnu, og nú hevur felagið rættiliga fingið fótin fastan, har teir í dag veita tænastur til eitt nú heimsins størstu seismikkfeløg.

Saman við góðum og dugnaligum starvsfólkum hava brøðurnir megnað at hildið fast um fiskivinnuna, samstundis sum teir hava bygt upp nýggja vinnu, ið gevur føroyskum siglandi nýggjar møguleika, avbjóðingar og inntøkur.

At felagið ongar ætlanir hevur um at minka um sítt frálandavirksemi, sóu vit á Skála ein leygarmorgun herfyri, tá ið hin fyrri av tveimum nýbygningum varð navngivin og latin felagnum.

Seinna skipið, sum stendur í byggihøllini á Skála, verður ætlandi latið felagnum um hálvan september í ár.

Hetta eru systirskip, ið skulu brúkast sum veitingarskip í seismikkvinnuni. Thor Alpha, sum fyrra skipið eitur, fer í Meksikanska Flógvan. Teir hava langtíðaravtalur um uppgávur í fleiri ár.

Thor Alpha er stívliga 55 metrar langur, og byggikostnaður liggur um góðar 76 miljónir krónur. Systirskipið verður nakrar miljónir krónur dýrari og fer helst at kosta einar 80 miljónir krónur.

### Positiv gongd

At felagið nú eisini er farið undir at smíða nýggj skip til frálandavinnu, merkir, at positiv gongd framhaldandi er í hesi vinnu. At leirvíkingar, sum eru nýggir á hesum marknaði, eisini byggja nýggj skip til frálandavinnu, er tekin um, at hetta eru íløgur, sum feløgini trúgva upp á kunnu forrenta seg.

Felagið Thor hevur eisini útvegað sær eina skrúvuskipan aftrat, og eingin skal tí gerast skakkur, um enn ein sáttmáli í næstum verður undirskrivaður um skipasmíð.

Í samlaða flotanum hjá samtakinum Thor, sum fevnir um fiskivinnu og frálandavinnu umframt skrivstovuvirksemi, starvast í dag fleiri hundrað fólk. Felagið arbeiðir at kalla um allan knøttin í frálandavinnu, og fiskiførini fiska bæði í føroyskum sjógvi og á fjarskotnum leiðum.

### Kendur veitari

Tá ið oljuráðstevnur eru kring um okkum, eru umboð fyri Thor við á hesum stevnum, har tey serliga hitta sínar samstarvsfelagar og røkja gomul vinarbond. Nú Shipping Føroyar 2008 á fyrsta sinni verður hildin, er ráðstevnan sjálvsagt eisini eitt gott høvi hjá felagnum at hoyra, hvat væntandi er í framtíðini við føroysku altjóða skipaskránni (FAS).

Samtakið Thor er vorðið ein kendur veitari á sínum øki, og felagið hevur sítt virksemi víða um heimin.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*